

# Fyri sjey bókum síðani ...

## Bókaklumma

»So er ikki annað at gera enn at koyra onkrar av øllum hasum bókunum vekk«

Eg stardi vantrúgvin at vinkonuni, sum júst helt seg hava foreirað mær mest eyðsýndu loysnina á mín hillatrupulleika.

Koyra bøkur vekk! Var hon skítør í høvdinum? Myndir av bókabrenningum og líknandi halgibrotum flákraðu fyri eygunum á mær. Vinkonan visti týðiliga ikki, hvat hon var uppi ímóti. Eg, sum nóg illa fái meg til at lata bókasavninum bøkur aftur, tí eg haldi meg eiga tær, tá eg havi lisið tær.

»So kundi tú eisini passandi sett restina í system samstundis«, helt vinkonan fram í bakgrundini.

Tað var ikki fyrstu ferð eg hevði hoyrt hatta uppskotið.

Eg hevði einaferð ein sjeik, sum var um at blíva svakur av, at eg ikki setti bøkurnar í alfabetiskt system - ella bara okkurt system, sum hann plagdi at siga. Eg minnist ikki, um eg nakrantíð tímdi at forklára honum 'mítt system', tí í míni verð var tað himmalrópandi upplagt: eg seti bøkur frá mær uttast á hillini, so hvørt, sum eg lesi tær. Snilt og logiskt. Og ikki minst einfalt, tá eg skal finna bøkur aftur. So hugsi eg bara: hatta má vera fyri eini sjey bókum síðani, og so telji eg meg fram - ella tað vil siga aftur. Skulu vit longur aftur, býti eg reolirnar upp í tíðarskeið: tannáringur í Klaksvík, fríur fuglur í London, lesandi í Århus ...

Eg lati nostalgisk eyguni glíða leitandi eftir bókaryggunum og minnunum - steðgi við eitt eintak av *Alheimsins einglar*, sum týðarin illa vildi lata mær, tí hann var so harmur um ein stavifeil á síðu 12 - víðari framvið (næstan) samlaðu verkunum hjá Philip Roth, sum av álvara lat míni bókaeygu upp - og har, mitt í øllum Erica Jong'sa *Kisses and parachutes*, ella tað vil siga tað, sum var eftir av henni, eftir at hundurin hjá mær bókstavliga hevði roynt at tyggja seg ígjøgnum hana. Bókin var nú onki serligt, men tað var hundurin, og tí goymi eg bókina við hansara fittu bítimerkjum. Tað finnast altíð orsøkir til at goyma eina bók, tí tað finnast enn fleiri orsøkir til at taka hana fram aftur, argumenteri eg við meg sjálva, áðrenn vinkonan kemur við skrelliposanum. Skilti eg í grundini nakrantíð Dostojevskij, tá eg læs hann sum 18 ára gomul? Og hevði tað ikki verið stuttligt at hitt Hannis Martinsson aftur sum ungan detektiv í *Blíð er summarnátt*?

So avgjørt! Eftir fimm sekundum havi eg sannført meg sjálva og funnið eina loysn. Eg smekki eina nýggja reol upp fyri eina hurð, sum eg allíkavæl ikki brúki. Sjálvandi. Hvat í verðini skal man við hurðum, tá man hevur stovuna fulla av bókum á tremur við hurðum inn í spennandi heimir, filosoferi eg sjálvhátíðarliga.

Eg tori ikki at siga, hvat eg ynski mær í jólagávu. Ikki hart í hvussu er, meðan vinkonan er inni. Beint nú ivist eg í, um eg fái sannført hana um, at ein bókagáva forrestin eisini er ein langtíðarloysn. Hví? Tí tú kanst lata hana upp umaftur og umaftur …

Góðan lesihug

Anna V. Ellingsgaard
redaktørur

Sosialurin